**Brexit og Føroyar – hvørji eru okkara áhugamál**

Góðan dagin øll somul.

Brexit er millum heilt stóru heimspolitisku hendingarnar í okkara tíð. Fyri okkum í Føroyum er talan um eina tí størstu einstøku uttanríkispolitisku avbjóðingina, sum vit standa yvirfyri. Við Brexit kunnu vit vænta fleiri broytingar á handils- og fiskivinnuøkinum, ið eru hornasteinarnir í okkara uttanríkispolitikki.

Spurningarnir eru nógvir. Hvussu tryggja vit, at føroyskar fyritøkur sleppa undan handilsforðingum, tá tær selja til Bretlands? Hvussu verða kvoturnar býttar, nú vit fáa eitt strandarland afturat? Og hvat við mongu føroyingunum, sum lesa ella ætla sær at lesa í Bretlandi?

Landsstýrið leggur nógv fyri til tess at fremja okkara áhugamál. Vit hava sett ein serligan Brexit-bólk at fylgja gongdini og at greina, hvørjar avleiðingar og møguleikar Brexit hevur við sær. Eisini hava vit sett okkum í samband við bretsku og skotsku stjórnirnar fyri at tosa um broytingarnar og framtíðar møguleikar.

Men hvørjar eru so okkara avbjóðingar? Hvørji eru okkara áhugamál?

Tað er tað, eg eri boðin her í dag at greiða frá í stuttum.

Lat meg byrja frá einum enda av.

***

Bretski marknaðurin er millum størstu útflutningsmarknaðirnar hjá okkum. Í nógv ár var Bretland tættasti handilsfelagin hjá Føroyum. Fyri fáum árum síðani vóru Føroyar triðstørsti fiskavøruútflytarin til bretska marknaðin. Seinastu 10 árini er útflutningurin til Bretlands tó minkaður nakað, og hetta kemst serliga av, at toskastovnurin er so illa fyri.

Bretar keypa fyrst og fremst føroyskan tosk og føroyskan laks. Í 2015 stóð toskur fyri einum triðingi av útflutningsvirðinum til Bretlands, og aldur laksur fyri næstan 40%. Hini størru fiskasløgini eru hýsa, svartkalvi og upsi. Góð 3% av samlaða innflutningsvirðinum er úr Bretlandi. Talan er serliga um mat, drykkjuvørur, tubbak og bilar.

Tá Bretland endaliga fer úr ES, verður handilssáttmálin millum Føroyar og ES ikki longur grundarlagið undir handilsviðurskiftunum við Bretland. Sama er galdandi fyri heilsufrøðiliga sáttmálan við ES um framleiðslu av fiskavørum.

Nú vit standa í einari broytingartíð, er tað týdningarmikið at vit seta okkum greið mál. Okkara mál á handilsøkinum er púra greitt:

greitt: Vit vilja hava líka góð ella betri viðurskifti við Bretland komandi árini.

Tað sama ger seg galdandi á fiskivinnuøkinum.

***

At Bretland fer at umsita egnu fiskivinnu fer at ávirka føroysk áhugamál á fleiri økjum. Okkara fiskiveiðiavtala við ES snýr seg um sínámillum kvotabýti og atgongd at fiska í sjóøkinum hjá hvørjum øðrum. Føroysk skip veiða tá í stóran mun í bretskum og írskum øki, tá tey royna í ES sjógvi.

Eftir Brexit fer fiskiveiðiavtalan við ES ikki longur at fevna um bretskt sjóøki. Tí er eitt annað høvuðsmál í Brexit fyrireikingunum at gera sínámillum avtalu við bæði Bretland og ES um fiskiveiðu.

Føroyar eru týðandi leikari í samráðingum um tilfeingið í Norðuratlantshavi.

Vit skulu helst venja okkum til, at Bretland eisini fer at gerast ein týðandi partur í strandarlandasamráðingunum, serliga í samráðingunum um býtið av makreli og svartkjafti. Og hetta fer at broyta dynamikkin í samráðingunum munandi, tí ein stórur leikari afturat kemur til samráðingarborðið – og tað mugu vit verða fyrireikað til.

Fiskur og handil fylla nógv í okkara Brexit-tilgongd, men ikki alt.

**

Nógvir føroyingar – umleið 100 - lesa í Bretlandi. Tá Bretland fer úr ES verður tørvur á avtalum, sum tryggja føroyskum lesandi góða atgongd til bretskt universitet. Í dag hava føroysk lesandi eftir avtalum millum Føroyar og ávikavist Ongland og Skotland somu atgongd til teirra universitet sum ES borgarar.
Avtalurnar eru knýttar at rættindum hjá ES-borgarum. Tí verða treytirnar fyri føroysk lesandi í fyrstu atløgu helst ávirkaðar av avtaluni millum ES og Bretland um útliman.

Føroyar hava eisini atlimaskap í granskingarsamstarvinum hjá ES. Bretskir granskarar og granskingarstovnar eru millum mest týðandi samstarvspartarnar hjá føroyskum granskarum, sum hava fingið stuðul úr granskingarsamstarvinum. Eins og innan øll onnur øki er óvist, hvussu framtíðin hjá Bretlandi fer at vera í granskingarsamstarvinum. Tí fylgja vit eisini væl við gongdini á hesum øki.

***

Føroyar standa valla ovast á innanhýsis innbjóðingarlistanum hjá bretsku stjórnini, nú hon fyrireikar seg til eina nýggja tíð uttanfyri ES.

Tí er tað umráðandi, at vit troyta allar møguleikar, og ávirka á røttum stað,

so Føroyar fáa so gagnlig viðurskifti, sum gjørligt við Bretland.

Og tað ger landsstýrið eisini. Stutt eftir, at úrslitið av fólkaatkvøðuni varð greitt, sendi landsstýrið skriv til bretska handilsmálaráðharran og fiskimálaráðharran. Vit vístu á tætta sambandið millum londini og tørvin á at skipa eitt framtíðar samstarv.

Føroysk embætisfólk hava síðani verið á fundi við ovastu samráðingarfólkini hjá ES. Vit hava hitt bretskar myndugleikar og umboð fyri Brexit-bólkarnar í grannalondunum. Fyri tveimum vikum síðan hittu vit bretska fiskimálaráðharran.

Eisini fylgja vit væl við, hvussu okkara grannalond skipa seg, og hvørjar tankar tey gera sær um Brexit.

Her at enda vil eg takka fyri høvið at greiða stutt frá føroyskum áhugamálunum í sambandi við Brexit. Eisini vil eg rósa fyrireikararunum fyri at seta eitt so týðandi evni á skrá. Vónandi fáa vit eitt livandi og gevandi orðaskifti seinnapartin.

Takk fyri!

Aksel V. Johannesen